# rvi enn sjálvdrátti

tó nakrar yvirtøkur, sum sambandsflokkurin sigur seg vera ímóti, og tí er ikki meiriluti í samgonguni fyri hesum leisti. Men lítil ivi er um, at meiriluti er fyri hesum leistu í tinginum.

## Heimurin broytist

Í hesum spurningi skal atlit takast til heimin kring okkum og tað altíð nevndu alheimsgerð. Í næstum verður fríhandilssáttmáli við Ísland undirritaður, kumuleringsavtalan kemur vónandi ógvuliga skjótt, og so er ein handilssáttmáli við Russland, sum liggur í bíðar. Føroyar eru eftirbátur á nógvum økjum, og hava vit brúk fyri at lata okkum upp og gerast meira altjóða. Her er EFTA ein leistur sum kann brúkast, og hann tykist møguligur at fáa ígongd skjótt, tí tað ikki er neyðugt at blanda tjóðskaparmálið uppí. Fleiri røddir hava verið frammi um at EFTA er ein doyggjandi felagsskapur og at ES er framtíðin, og tað kann gott verða, at so er. Her mugu vit ikki gloyma, at ES er í svárum trupulleikum av at grundlógarleisturin ikki vann undirtøku, og at ein fittur partur av ES londunum fyrst vóru limir í EFTA. Ein EFTA limaskapur útilokar ikki neyðturviliga ein ES limaskap seinni, um meiriluti verður fyri tí í Føroyum. Tað er jú hent fyrr, at lond eru farin úr EFTA og beinleiðis í ES. Tað er tí neyðugt at kanna nærri júst hvat ber til við EFTA, og hvussu tætt samband til ber at fáa við ES, uttan at gerast limur. Brennandi spurningurin her er, um tað ber til at fáa betri avtalu og samstarv við ES, enn EFTA londini hava. Tí kann sigast, at arbeiði við at fáa eina associeringsavtalu við ES, møguliga de facto liggur í einum EFTA limaskapi. Men sjálvur spurningurin um EFTA limaskap krevur eisini, at politiskur vilji er fyri at tillaga seg teimun krøvum, sum verða sett.

## Noreg og Ísland?

Tað hevur somuleiðis ávirkan á okkara støðu, um Noreg og Ísland knappliga velja at gerast partur av ES, men tað hava londini ikki gjørt enn. Hinvegin kann hugsast at Føroyar, Ísland og Noreg kunnu samstarva meira um fiskivinnuna í Norðuratlantshavið, tí havøkið, hesi trý londini hava tilsamans, er rættiliga umfatandi, og tí kann samstarv millum hesi trý londini geva eina felags styrki.

## Lata Føroyar upp

Føroyar royna at lata seg upp, men fleiri meta at tað gongur ov seint fyri seg. Tað kann vera nakað um tað, og orsakirnar eru fleri. Ein orsøk er at vit eru sera lítil, og tí ikki viga so nógv í altjóða skipanini; onnur at ríksirættarliga skipanin ger, at vit ikki av okkara eintingum kunnu gera sum okkum lystir; og at tað er kanska fløkt fyri triðjalond; at vit í Føroyum ongantíð hava raðfest uttanríkispartin í frammarliga og tí ongantíð hava havt eitt Uttanríkisráð við egnum Landsstýrismanni, sum burturav arbeiddi við at betra um okkara altjóða viðurskifti; og ikki minst at flokkarnir ikki hava tikið hesa uppgávuna í serliga stórum álvara, og tí hevur lítið verði arbeitt á hesum økinum.

## Felags vinningur

Kjarnin í bæði ES og EFTA samstarvinum er, at meira fæst burturúr samstarvi enn sjálvdrátti. Munurin millum felagsskapirnar er hvussu tætt samstarvið skal vera, og á hvørjum økjum. Harafturat eru nógv fleiri lond og íbúgvar í ES, og ES er ein altjóða aktørur, sum eisini roynir at styrka seg á altjóða leikpallinum. Ikki kann sigast at EFTA er ein altjóða leikari við slíkari tyngd.

Hjá okkum er neyðugt at finna fram til, hvørt vit vilja standa uttanfyri slíkt økissamstarv, ella um vit ynskja limaskap í EFTA ella ES, og um hvørjar treytirnar eru fyri limaskapi. Serliga tjóðskaparspurningurin tykist gera, at tað verður ógvuliga torført at fáa eina semju um limaskap í ES. Hesin spurningur hevur ikki ávirkan á EFTA limaskap, uttan so at tað krevur nakrar yvirtøkur. Spurningurin um hvørt Føroyar kann luttaka í EBS samstarvinum, tá Danmark er við sum partur av ES, kann eisini tulkast fleiri vegir. Í mun til uttanríkispolitisku heimildirnar ber tað helst ikki til, men tað stendur ongastaðni í uttanríkispolitisku heimildunum, at tað ikki ber til at finna aðra loysn, tá tað ikki ber til at brúka hana. Tí er tað upp til føroyingar sjálvar at koma við ynskinum og vísa á, hvussu tað kann gerast, um áhugi er fyri tí. Tað má metast sum eitt afturhaldssinnað sjónarmið, sum danir hava um at Føroyar ikki kunnu gerast limir í EBS. Spurningurin er tó meira um donsk sjónamið í hesi støðu, og um Føroyar hava áræði og dirvi til at vísa á aðrar nýtiligar loysnir.

Keldur: www.efta.int
www.tinganes.fo

### EBS samstarvið

EBS samstarvið umfatar tey 25 ES londini umframt tey 3 EFTA londini Noreg, Ísland og Liktenstein

EBS er eitt tætt búskaparligt samstarv, sum partvíst samansjóðar Noreg, Ísland og Liktenstein í innara marknaðin hjá ES og umfatar tey fýra frælsini, vørur, tænastur, kapital og persónar.

Talan er um sonevnt vannrætt samstarv viðvíkjandi teim fýra frælsunum, sum umfatar: almannapolitik, almnnarættindi hjá verkafólki, brúkaravernd, hagfrøði og vinnulóggávu

Síðusamstarv uttanfyri tey fýra frælsini er m.a. innan: gransking og tøkniliga menning, kunningartænastur, umhvørvið, almannapolitik, brúkaravernd, ferðavinnu, vinnuøki og borgaravernd.

EBS umfatar sostatt reglur fyri kapping og stuðul. EBS samstarvið ger eisini at Noreg, Ísland og Liktenstein eru partur av fleiri ES skipanum í sonevnda síðusamstarvinum



*Kunnu báðir sita við EFTA borðið?*